

# Frá milliardunum til tey fimtbestu

Hóast Shay Given er fastur maður millum stólparnar á City of Manchester Stadium, er tað álitisváttan av teimum heilt stóru, nú heimsins ríkasta fótbóltsfelag hevur keypt sær rættin til spæliloyvið hjá Gunnari Nielsen
Mynd: Álvur Haraldsen

**Tað er munur á heimsins ríkasta fótbóltsfelag og walisiska Wrexham. Men hjá Gunnari Nielsen telja royndirnar, sum hann kann fáa her, mest**

Tað vóru stórtíðindi í føroyska fótbóltsheiminum, tá Gunnar Nielsen skrivaði sáttmála við Manchester City. Hóast steypaskápið hjá bláa felagnum í Manchester ikki er eins stúgvandi fult, sum tað er hjá reyðu grannunum á Old Trafford, er Manchester City í dag eitt av mest spennandi fótbóltsfeløgunum yvirhøvur.

Nýggja rákið, har ríkmenn í milliardaflokkinum hava keypt seg framat valdinum í Premier League feløgunum er mest av øllum sjónligt hjá Manchester City, og seinasta árið er neyvan ein vika farin framvið, uttan at søgur um metstór keypstilboð upp á størstu stjørnurnar í heiminum hava verið á ymsu breddunum. Og í hesum ljósinum er keypið av einum føroyskum U21-landsliðsmálverja serstakliga áhugavert. Ikki minst, tá talan er um málverja, sum City-venjarin, Mark Hughes, sjálvur hevði undir sær, tá hann fram til í fjør summar stóð á odda fyri Blackburn.

Í Manchester City er tó ikki bara sum at siga tað at sleppa framat besta liðnum. Og slettis ikki á málverjaplássinum, har Shay Given tykist rimmarfastur framman fyri menn sum Joe Hart og Kasper Schmeichel í kappingini um einsamalla plássið millum stólparnar.

Blekkið á sáttmálanum var heldur ikki meira enn starnað, fyrr enn tað stóð greitt, at Gunnar Nielsen skrivaði undir leigusáttmála við Wrexham í fimti bestu ensku deildini. Men hetta merkir tó ikki, at ambitiónirnar hjá føroyska skansanum eru minkaðar.

– Tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at eg skuldi leigast út, soleiðis at eg fái spælitíð. Sum so skuldi hetta kanska ikki verða fyrr enn eftir summarfrítíðina, men í Wrexham høvdu tey sæð meg spælt, og har vilja tey fegin, at eg verði partur av hópinum seinasta partin av kappingarárinum, segði Gunnar Nielsen, tá skiftið varð veruleiki.

– Tað er betri at spæla við fyrstaliðnum hjá einum felag, sum spælir í lægri deild. Sjálvandi er støðið eisini hampuliga høgt millum eykamenninar hjá Manchester City, men trýstið her er ikki tað sama, sum tá tú spælir fyri besta liðið í einum felag, og tí ivist eg ikki í, at hetta eisini kann hjálpa mær í mínari menning sum fótbóltsspælari, segði Gunnar Nielsen í práti við Rás2.

Og so er tað sjálvandi eisini landsliðið, sum dregur. Her hevur Gunnar fingið spælitíð á U21-liðnum, meðan bíðað hevur verið eftir møguleikanu at loysa Jákup Mikkelsen av sum A-landsliðsmálmann. Rokið var ikki heilt einki, tá Gunnar varð tikin framum, tá Føroyar fyri stuttum spældu móti Íslandi. Og hóast diskussiónin um Jákup ella Gunnar helst fer at standa við nakað afturat, so gjørdi Gunnar í øllum førum sítt til, at føroyskir landsliðsfjepparar eisini komandi mongu árini kunnu kenna seg vísar í, at málverjasessurin á fótbóltslandsliðnum verður væl og virðiliga roktur.

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

# Símin millum lyklaspælararnar

**Hóast hann hevur havt ilt við at bíta seg fastan millum teir fyrstu ellivu á føroyska fótbóltslandsliðnum, hevur Símun Samuelsen langt síðani sligið sítt navn fast í íslendskum fótbólti**

Hóast ein avleggari varð gjørdur til norska Notodden í fjør, var ongan tíð nakar ivi um, at Keflavík vildi hava føroyska Símun Samuelsen aftur í hópin.

Her hevur Símun verið fastur partur seinastu trý kappingarárini, og eingin orsøk er til at halda, at hann verður minni fastur maður í ár.

Undanfarnu árini – og serliga í fjør – hevur Keflavík av álvara bjóðað av í íslendska fótbóltsoddinum, og hóast fíggjarliga órógvin ikki minst hevur gjørt um seg í Íslandi, so verður framvegis roknað við, at Keflavík verður millum ovastu, tá roknistykki verður gjørt upp seinast í september mánaði.

Higar til hevur Símun verið við til vinna íslendsku steypakappingina, men tað er hann ikki einsamallur føroyingur um. Meistaraheitið í grannatjóð okkara er tó enn eingin føroyingur, sum hevur vunnið, og kann Símun halda støðið, sum hann vísti í landsdystinum móti júst Íslandi í mars mánaði, kann hann væl verða ein av høvuðsaktørunum hjá Keflavík í hesum stríðnum. Og samstundis gjørdi hann í hesum dystinum greitt, at fast pláss á føroyska A-landsliðnum eisini er væl og virðiliga í nánd.

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo




Símun Samuelsen og liðfelagarnir í Keflavík lógu leingi til gullið í fjør, men tað glapp í evstu løtu. Nú verður ein nýggj roynd gjørd
Mynd: Álvur Haraldsen